# Svartkjaftaskipini royna á markinum millum Føroyar og Hetland

**- Higartil í ár hava vit tikið ímóti teimum 1.000 tonsunum, sum Christian í Grótinum og Norðborg høvdu, og nú skipini væntandi koma innaftur at landa, vóna vit, at tey enda túrin í Fuglafirði, siga tey á Havsbrún**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Svartkjaftaskipini hava seinastu dagarnar roynt á markinum millum Føroyar og Hetland.

Havsbrún í Fuglafirði fekk fyrstu lastirnar í síðstu viku. Tað vóru Christian í Grótinum og Norðborg, sum vóru inni við umleið 1000 tonsum tilsamans.

### Sprongdist

Tá ið skipini komu suður aftur á leiðirnar, fekk Christian í Grótinum eitt so stórt hál, at trolposin sprongdist. Síðan hava teir hava tvey onnur hampiliga góð hál.

Fiskiskapurin á leiðini er minkaður, nú hann rættiliga hevur øtlað veðrið. Veðrið spælir nógv inn, tá ið ræður um svartkjaftaveiði.

Í løtuni er illveður á leiðunum, og tað er ikki roynandi sum er. Men hann sigur frægari veður í kvøld, og síðan sigur hann aftur veksandi vind.

Skipini ætla tískil at royna til í morgin, og síðan leggja tey væntandi leiðina til lands.

### Jupiter sleipaður

Á Havsbrún vistu tey í morgun at siga, at Finnur Fríði hevur útvið 2.000 tons inni, og Tróndur í Gøtu hevur eini 800 tons.

Jupiter hevur eisini verið har suðuri á leiðini, men teir fingu maskinskaða, og Brimil hevur sleipað skipið á Skála.

Høgaberg er í løtuni í dokk á Skála.

Á Havsbrún siga tey seg vóna, at skipini, sum nú royna har suðuri á leiðini, koma hendan vegin at landa.



*Higartil í ár hevur Havsbrún tikið ímóti 1.000 tons av svartkjafti frá Christiani í Grótinum og Norðborg. Á virkinum vænta tey sær meira svartkjaft, sum hendan vikan líður*

*Mynd: Yngve Olsen*

- Higartil í ár hava vit tikið ímóti teimum 1.000 tonsunum, sum Christian í Grótinum og Norðborg høvdu, og nú skipini væntandi koma innaftur at landa, vóna vit, at tey enda túrin í Fuglafirði, siga tey á Havsbrún.

---

## Einki nýtt um Grana

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri ljóðaði, at Eirikur Olsen, sum eigur línuskipið, Grana á Tvøroyri, skuldi hava selt skipið til Klaksvíkar.

Tað ljóðaði eisini, at reiðaríið, JFK-Trol, sum frammanundan eigur flakavirkið Kósina, skuldi vera keypari.

Tá ið vit høvdu Eirik í telefonini í morgun, vildi hann ikki vátta hesi tíðindi.

### Einki avgjørt

- Nei, enn er einki avgjørt. Nú fáa vit at síggja, hvussu verður, tá ið vit koma heim aftur.

Grani var staddur eystanfyri, tá ið vit høvdu skiparan í telefonini í morgin.

- Vit draga – og her er ódnarveður. Lat okkum tosa saman, tá ið vit koma heimaftur, segði Eirikur Olsen, skipari.

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands:

# Neyðugt við fleiri limum

**Jógvan Fagraklett, formaður í felagnum Føroyskir Fiskimenn Uttanlands, harmaðist á aðalfundinum um, at telefonstuðulin er avtikin – uttan, at myndugleikarnir hava sett seg í samband við felagið, sum varðar av fiskimonnum uttanlands**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Vit mugu hava fleiri limir, um felagið skal kunna gera nakað munagott fyri føroysku fiskimenninar í øðrum londum, sigur formaðurin í felagnum hjá fiskimonnum uttanlands*

Herfyri hevði felagið, Føroyskir Fiskimenn Uttanlands, aðalfund.

Formaður felagsins, Jógvan Fagraklett, greiddi frá um samdøgursfrádráttin, har hesin eftir fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Bárð Nielsen, er hækkaður við virkni frá 1. januar 2005.

Jógvan fanst tó at, at dagatalið, sum er ásett í kunngerðini, er ein forðing, sum virkar darvandi fyri avloysarar.

Á aðalfundinum kom eisini fram, at nú er møguligt at tryggja seg í ALS við at rinda 3.000 krónur um árið, har Føroyar hava dupultskattaavtalu.

Jógvan greiddi eisini frá, at um tú vendir tær til sjúkrakassan í viðkomandi øki, fært tú eitt skjal at vísa fram hjá lækna ella tannlækna í norðurlondum og stóra Bretlandi.

Annars harmaðist formaðurin um, at menn ikki sýna felagnum meiri áhuga.

Hann helt, at skal felagið gera nakað munagott, krevst, at felagið hevur ein stóran limaskarða, tí limagjaldið er bert slakar 17 krónur um mánaðin ella 200 krónur um árið.

Jógvan Fagraklett harmaðist eisini um, at telefonstuðulin er avtikin – uttan, at myndugleikarnir hava sett seg í samband við felagið, sum varðar av fiskimonnum uttanlands.

Hann helt, at grundgevingarnar hjá Bjørn Kalsø fyri avtøkuni samsvara ikki við tað, sum fiskimenn uttanlands kenna til.

Eftir formansfrágreiðingina var nevndarval:

Í gomlu nevndini sótu: Jógvan Fagraklett, formaður, Erhard Muller, næstformaður og Jóhan Hansen.

Í desember tók Erhard seg úr nevndini,

og varamaðurin, Høgni W. Høgnesen, tók sæti.

Nýggja nevndin í felagnum er nú henda:

Fyri Danmark: Jógvan Fagraklett, formaður og varamaður er Jákup Súni Jacobsen.

Fyri Noreg: Høgni Waag Høgnesen og varamaður Absalon E. Hansen.

Fyri Kanada: Jóhan Hansen og varamaður William Hansen.